

# Goldman Sachs-stjóri hugtikin av norskum oljugrunni

**Jan Müller**

18.11.2013 - 14:07

Oljan.fo

“Hetta er ein ótrúligur stovnur,” sigur ovasti stjórin í Goldman Sachs, Lloyd Blankfein um norska oljugrunnin.

Hann fer so langt sum at siga, at hann er hugtikin av og hámetir henda heimsins største íløgugrunn, sum goymir nærum 5000 mia. kr.

Spurdur av norska blaðnum Dagens Næringsliv, hvørji ráð hann vil geva slíkum stórum íløgugrunnum sum Oljugrunninum, svarar hann, at hann helst ikki skal geva slík ráð, men hann dylur ikki fyri, at stovnurin er ein tann mest professionelli íleggjari hann kennir.

“Eg havi stóra virðing fyri stovninum, og tað hevur restin av heiminum esini. Hetta er ein fantastisk organisation,”

Blaðið skrivar eisini, at Goldman Sachs lat upp dyrnar fyri størstu einstøku norsku íløguni í einum kinesiskum felag, China Pacific Insurance Group í 2012